VÁGA KOMMUNA

**Upptøkureglur fyri dagstovnar í Vága Kommunu**

1. Dagstovnarnir í Vága kommunu eru fyri børn undir skúlaaldur.

2. Barnið og í minsta lagi annað av foreldrunum, sum hava foreldramynduleika/verji, skulu vera skrásett og búsitandi í kommununi fyri at fáa ansingartilboð hjá Vága Kommunu. Tó kunnu ættleidd børn koma á bíðilista, tá foreldur, ið ættleiða, kunnu vísa váttan, at teimum er ávíst serstakt barn. Eisini kunnu foreldur, ið hava í hyggju at flyta til kommununa, skriva seg á bíðilista 6 mánaðir, áðrenn flutt verður í kommununa.
Foreldur, sum ætla at flyta til kommununa úr útlondum, kunna fáa váttan um ansingarpláss, áðrenn tey eru skrásett í kommununi,

3. Harumframt kunnu foreldur, sum eru undir útbúgving ella hava eina ávísa uppgávu at loysa – og búgva uttanlands, fáa børnini ansað í tveir til seks mánaðir, treytað av, at tey hava váttan frá útbúgvingarstað ella arbeiðsgevara og talan er um avmarkað tíðarskeið.

4. Kommunan kann í serligum førum gera undantak frá punkt 2, t.d. um barnaverndartænastan hevur givið sítt tilmæli. Tá verður skrivlig avtala gjørd við avvarðandi kommunu, har barnið er búsitandi.

5. Øll, sum søkja ansingartilboð, fáa skrivligt svar um móttøku av umsóknini og við upplýsingum um, nær tey kunna vænta ansingarpláss.

6. Vøggustovur eru ætlaðar børnum í aldrinum frá uml. 5 mánaðir til umleið 3 ár. Barnagarðar eru ætlaðir børnum í aldrinum frá 3 til 7 ár. Útibarnagarðar eru ætlaðir børnum í aldrinum frá 4 til 7 ár. Bert um foreldrini ynskja tað, og um stovnsleiðarin annars metir hetta at vera námsfrøðiliga í samsvari við menningina hjá barninum, kann í einstøkum føri víkjast frá kravinum um aldursbýti. Foreldur kunnu í hvørjum einstøkum føri gera av, um barnið skal verða verandi í vøggustovu, tí tað ikki er búgvið at fara í barnagarð.

7. Full ansingartíð hjá barni er vanliga frá kl. $7^{15}$ til kl. $17^{00}$, tó í mesta lagi 9 tímar. Undantak kann gerast við leiðaran. Hálv ansingartíð er: fyrrapart, seinnapart ella aðru hvørja viku.

Børn, sum møta fyrrapartin, verða heintað seinast kl. $12^{15}$, og børn, sum møta seinnapartin, møta millum kl. $12^{45}$ og $13^{15}$.

8. Áðrenn barnið byrjar, skal upptøkuskjal útfyllast við upplýsingum um barnið og foreldur/verja.

9. Tá pláss er tøkt, skal fyrsta barnið á upptøkulistanum hava tilboð um ansingarpláss.

10. Um foreldur ikki taka av ansingarplássi, verður barnið ikki flutt afturum á upptøkulistanum, um tey framvegis ynskja ansingarpláss.

VÁGA KOMMUNA

11. Foreldur kunna søkja um, at barnið fær farloyvi frá ansingarplássinum í upp til eitt ár í senn við trygd fyri, at barnið fær ansingarpláss aftur í kommununi, tá farloyvistíðin er úti. Treytin fyri farloyvi er, at barnið er burtur frá ansingarplássinum í minsta lagi 3 mánaðir. Tó kann í serligum førum víkjast frá regluni um í minsta lagi 3 mánaðir.

12. Børn við serligum tørvi koma framum á upptøkulistanum í teimum førum, har barnaverndartænastan hevur givið eina nágreiniliga lýsing av støðuni hjá barninum. (Her verður hugsað um málsligar, sálarligar og sosialar trupulleikar).

13. Foreldur/verjar kunnu kæra avgerðir um upptøku til Trivnaðarnevndina í Vága Kommunu.

14. Tá barnið verður tikið úr ansing, skal skrivlig uppsøgn latast leiðaranum/kommununi seinast ein mána, áðrenn barnið gevst til tann 01. í einum mánaði.

Samtykt á kommunustýrisfundi tann 23 oktober 2013.

**Vága kommunustýri**

Rósa Samuelsen, borgarstjóri

Georg Hansen, skrivari